# Leysu bingjurnar bjargaðu skipinum

**Bingjurnar, sum skræddu seg leysar og gjørdu stóran skaða á dekkinum á Ice Lady, bjargaðu skipinum í seinna enda, tá tær tettu holið í dekkinum**

Í VANDASJÓGVI
*Edvard Joensen*



*Bingjurnar skræddu kappan oman av dekkinum, so sjógvur fossaði niður. Seinni tettu somu bingjur holið aftur. Fólk frá Tórshavnar Skipasmiðju hevur nú gjørt nýggjan kappa*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Bingjurnar á dekkinum á Ice Lady kílaðu seg fastar yvir stóra holinum, sum var í dekkinum. Tað gjørdi, at so lítið av sjógvi kom niður, at skipið kláraði at halda seg flótandi. Var tað ikki so, sakk skipið.

Árni Dam á Skipafelagnum Føroyar, sum er umboðsmaður hjá Ice Lady í Føroyum, greiðir frá, at tá lastin skeytst umborð á Ice lady, slitnaðu tvær bingjur, sum stóðu á yvirdekkinum eisini. Og sum rímiligt var, stóðu tær ikki stillar í slíkum líkindum, sum skipið var í.

Tær furaðu eftir dekkinum og gjørdu skaða fyri sær. Millum annað skræddu tær kappan, har niðurgongdin er, oman av og slættaðu dekkið. Har gjørdist eitt heilt stórt hol í dekkinum. Hetta mannholið tók nógvan sjógv, og varð tað standandi soleiðis gapandi opið, var eingin ivi um, at skipið hevði sokkið, sigur Árni Dam.

Men lukkutíð fyri skip og manning, brotnaðu føturnir undan aðrari bingjuni, sum lá og sigldi eftir dekkinum, og hon kílaði seg fasta úti í borðinum, orsakað av slagsíðuni, skipið hevði fingið. Hin seinni reistist hálv oman á hana og bant so báðar fastar. Og tilvildin og eydnan vildu tað soleiðis, at hendan fyrra stóð beint yvir hesum opna mannholinum og typti soleiðis so mikið, at ikki tann nógvi sjóvurin kom niður.

– Høvdu beinini ikki brotnað undan, so bingjan stóð tætt at dekkinum, kom skipið ikki aftur í aftur, ivast Árni Dam ikki eina løtu í.

## Brimil skjótur

Skjóta hjálpin frá Brimli eigur eisini sín góða lut í, at tað spældi so væl av, sigur Árni Dam.

Brimil var skjótur hjá Ice Lady og fekk beint henni inn í Vágahavið, heldur enn at hon var farin lensandi suður móti Bankanum. Var hon endað so sunnalaga, hevði ikki verið tespiligt at komið norður fyri aftur í tí veðrinum, sum var, og í harðasta streymi, vísir Árni Dam á.

– Eitt sundurbrotið skip við slagsíðu upp á eini 20 stig er ikki so at fara um havið við í illveðiri, vísir hann á.

Árni Dam er ikki nøgdur við lastingina, sum verið hevur, áðrenn skipið er farið til havs.

Ikki tað, at teir, sum lastað hava, ikki hava vitað, hvat teir gjørdu. Men heldur pakningin, lastin var í, er hann ivasamur um.

Frystilast er, og alt var pakkað í plastik og lagt á plattar. Og tá skal einki til, áðrenn tað rósar. Tí so tætt verður eingin last stúvað, at ikki nakað av luft er ímillum.

– Talan skal bara vera um millimetrar í einum borði, so hava vit fleiri centimetrar í hinum borðinum, vísir Árni Dam á. Og hendan lastin gleið væl, sigur hann og nevnir sum dømi, at teir skumpaðu onkran platt upp á pláss við at seta ryggin ímóti, tá hann var komin upp á bryggjuna.

– So lætt flutti tað seg, vísir hann á. So tað sigur seg sjálvt, at í eini last í øgiligum rulli, endar skjótt galið.

Lastin var stúvað, sum vanligt er, við pútum í millum har, opini vóru, Men púturnar nyttaðu so einki í hesum førinum. Tær brustu, og so var rættiliga galið.

## Stórarbeiði

Tað var stórarbeiði at taka upp eftir skaðan, sum Ice Lady fekk, sigur Árni Dam. Teir hava havt 460 plattar í landi og umskipað mestsum hvørt einasta kolli í lastini var.

Tórshavnar Skipasmiðja hevur havt garneringina frá í stórum parti av lastini og gjørt nógv av nýggjum. Eisini nýggjan kappa á dekkinum, sum vera man.

– Vit máttu tøma stóran part av lastini úr skipinum fyri at sleppa til at síggja, hvussu umfatandi skaðin var. Og hann var stórur, sigur Árni Dam.

Klassin kravdi lastina betri tryggjaða, áðrenn skipið slapp avstað aftur, sigur hann. Millum annað hava skipasmiðjumenninir sveisað fleiri stúttur á millumdekkunum og upp við síðuportrunum. So nú verður lastin eisini tryggjað við reimum, sigur Árni Dam.

Fólk hjá Skipafelagnum hevur arbeitt í meira enn eina viku við at tøma Ice Lady, pakkað um og lasta av nýggjum, sigur Árni Dam. Mánadagin og fríggjadagin í seinastu viku máttu teir biða eyka fólk og truckar til arbeiðis, tí tá var teirra fólk og útgerð upptikin av at lossa og lasta teirra egnu skip.

Ice Lady sleppur væntandi avstað aftur í dag, sigur Árni Dam, umboðsmaður hjá skipinum.




*Ice Lady hevði slagsíðu upp á eini 20 stig*

*Mynd : Brimil*



# Høgni á fólkating í mars

**Tá Tjóðveldisflokkurin hevur skipað seg á løgtingi, og tá Tórbjørn Jacobsen hevur avgreitt síni mál á fólkatingi, tekur Høgni Hoydal sæti á fólkatingi. Tjóðveldisflokkurin nýtir fólkatingsumboðanina, og allar teir møguleikar, hon hevur við sær, at virka fyri fullum føroyskum sjálvstýri**

FÓLKATING
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*



*Høgni Hoydal tá hann tók sæti á Fólkatingi eftir valið 21. november í 2001. Hann var bara og vendi á danatingi, tí ein landsstýrismaður kann ikki hava onnur størv. Tað er tó einki óvanligt í tí, at ein landsstýrismaður ella løgmaður stillar upp og verður valdur í Fólkatingið uttan at taka sæti – fyrr enn hann er farin úr landsstýrinum*

– Vit hava enn ikki endaliga gjørt av, nær eg aftur taki sæti á Fólkatingi. Ávísar uppgávur skulu fáast frá hondini, bæði innanhýsis í Tjóðveldisflokkinum, skipan okkara á tingi og ávísar uppgávur, sum Tórbjørn Jacobsen er í ferð við í Fólkatinginum júst nú, sigur Høgni Hoydal, tá vit spyrja hann, nær hann aftur tekur sæti á Fólkatingi.

Høgni Hoydal varð valdur á Fólkating við seinasta fólkatingsval, sum var 21. november í 2001. Hann fekk 2640 atkvøður, men av tí at hann var landsstýrismaður, mátti næsti maður taka sæti, og hann var Tórbjørn Jacobsen, sum fekk 870 presónligar atkvøður.

Høgni Hoydal er nú vanligur tingmaður, og nú hann á fyrsta sinni sleppur at royna seg í hesum leikluti, verður tað sum andstøðuleiðari. Umframt at vera formaður Tjóðveldisfloksins, er hann eisini formaður floksins á tingi.

– Vit skulu skipa flokkin, velja framsøgufólk o. a. Tórbjørn Jacobsen hevur fyrispurningar liggjandi í Fólkatinginum og eitt uppskot, hann setti fram í sambandi við at fáa innlit í Fíggjareftilitið. Hóast tað fleiri ferðir er avtalað, so veit okkara landsstýrismaður í fíggjarmálum ikki, hvussu støðan er í bankunum, tí hann fær ikki innlit í viðurskiftini hjá Fíggjareftirlitinum. Hesi mál skal Tórbjørn Jacobsen avgreiða, áðrenn eg taki sæti á Fólkatingi aftur, sigur Høgni Hoydal.

– Men eg rokni við, at tað verður einaferð í næsta mánaði, sigur Høgni Hoydal, sum bara hevur verið fólkatingsmaður í eina viku – tað var áðrenn Tórbjørn Jacobsen tók sæti fyri hann.

– Tá náddu vit at skipa Norðuratlantsbólkin – eitt arbeiði, sum Tórbjørn Jacobsen hevur ført víðari og bygt upp saman við grønlendsku umboðunum. Hesum arbeiði fari at halda fram við á fókatingi, sigur Høgni Hoydal, sum letur sera væl at úrslitunum, sum Norðuratlantsbólkurin hevur nátt.

Høgni Hoydal vísir á, at Norðuratlantsbólkurin hevur sett tríggjar arbeiðsbólkar, sum arbeiða við Ríkisrættarligu støðuni hjá Grønlandi og Føroyum, ein sum arbeiðir við hernaðarmálinum og ein sum arbeiðir við búskaparligu viðurskiftunum millum Grønland, Føroyar og Danmark.

Hetta er arbeiði, sum serfrøðingar gera, og sum verður fíggjað av Norðuratlantsbólkinum, sum er at rokna sum einhvør annar politiskur flokkkur í Danmark.

Norðuraltansbólkurin fær bólkastuðul frá Fólkatinginum. Hetta er tað, sum allir flokkar á fólkatingi fáa – lutvíst eftir tingmannatalinum. Minstu flokkarnir á fólkatingi hava vanliga fýra tinglimir, Norðuratlantsbólkurin hevur tríggjar.

– Vit hava gjørt av í Tjóðveldisflokkinum, at vit skulu brúka fólkatingsumboðanina fult út í arbeiði fyri okkara søk. Tað merkir, at vit brúka allar møguleikar, sum umboðanin gevur, eisini tær fíggjarligu møguleikar, sum vit hava sum partur av Fólkatinginum, sigur Høgni Hoydal, sum ikki ivast í, at Norðuratlantsbólurin er komin fyri at vera.

Men væntar Høgni Hoydal, at onkur annar politiskur flokkurin í Føroyum kundi komið upp í bólkin?

– Tað hevði sjálvandi verið ynskiligt. Vit bjóðaðu Lisbeth L. Petersen uppí, men hon takkaði nei, sigur Høgni Hoydal.

Óli Breckmann, sum fall á seinasta fólkatingsvali, var uppi í danska Konservativa flokkinum, meðan Jóannes Eidesgaard, sum eisini fall á seinasta vali, hevði sín egna tingbólk.

Høgni Hoydal sigur, at um tað gleðiliga hevði hent, at t. d. Javnaðarflokkurin og Fólkaflokkurin tóku undir við sjálvstýrispolitikkinum hjá Tjóðveldisflokkinum, so skuldu teir verið meira enn vælkomnir upp í bólkin, tí bólkurin hevur sum endamál at arbeiða fyri fullum sjálvstýri hjá Grønlandi og Føroyum, men Høgni Hoydal vísir samstundis á, at sjálvstýristilgongdin í Grønlandi er langt frá komin so langt sum í Føroyum, so hann kundi ímyndað sær rúm saktans kundi verið bæði fyri Javnaðarflokkinum og Fólkaflokkinum.
:

# Lønin fer til flokkin

**Fólkatingsmaðurin hjá Tjóðveldisflokkinum letur stóran part av fólkatingslønini til flokspolitiskt arbeiði**

FÓLKATING
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Fólkatingsmaðurin hjá Tjóðveldisflokkinum er helst lægst lønti fólkatingsmaðurin í kongaríkinum. Tí upp undir seinasta fólkatingsval, sum var 21. november í 2001, gjørdu valevnini hjá Tjóðveldisflokkinum eina avtalu um, at eingin teirra skuldi fáa fulla fólkatingsløn, sum er væl hægri enn tingmannalønin.

Meðan fólkatingslønin hjá føroyskum fólkatingsmonnum er slakar 50.000 kr um mánaðin, so liggur tingmannalønin úr umleið 30.000, alt eftir, hvar í landinum tú býrt. Býr tingmaður í Suðuroy ella í Norðoyggjum, fær hann 7.500 skattafríar krónur omaná.

– Tað er rætt, at vit, sum vóru valevni Tjóðveldisfloksins, gjørdu av, at tann av okkum, sum varð valdur, skuldi ikki fáa meira útgoldið av fólkatingslønini, enn tað sum ein tingmaður fær. Restin fer í ein grunn, sum hevur til endamáls at upplýsa um politikk Tjóðveldisfloksins, sigur Høgni Hoydal.

– Hetta er ein innanfloksgrunnur, sum tó einki hevur við roknskapin hjá flokkinum at gera, men ein grunnur, har til ber at søkja um pengar til ymiskt flokspolitiskt arbeiði, sigur Høgni Hoydal.

Fólkatingsmaðurin hjá Tjóðveldisflokkinum fær tí bara tann partin av fólkatingslønini, sum svarar til løgtingslønina eftir skatt.

**Fakta**

## Fólkatingsvalið 2001

Seiansta fólkatingsval var 21. november í 2001.

Báðir fólkatingsmenninir fullur, teir vóru Óli Breckmann úr Fólkaflokkinum og Jóannes Eidesgaard úr Javnaðarflokkinum.

Nýggir fólkatingsmenn gjørdust: Høgni Hoydal úr Tjóðveldisflokkinum og Lisbeth L. Petersen úr Sambandsflokkinum.

**Valúrslitið var hetta:**

| | | |
|---|---|---|
| (1) Sambandsflokkurin | 7196 | 27,3 |
| (2) Tjóðveldisflokkurin | 6565 | 24,9 |
| (3) Javnaðarflokkurin | 6165 | 23,4 |
| (4) Fólkaflokkurin | 5407 | 20,5 |
| (5) Miðflokkurin | 567 | 2,2 |
| (6) Sjálvstýrisflokkurin | 434 | 1,6 |

**Tey, ið fingu flestar atkvøður, vóru:**

| | |
|---|---|
| Jóannes Eidesgaard | 3676 |
| Høgni Hoydal | 2640 |
| Óli Breckmann | 2335 |
| Lisbeth L. Petersen | 2286 |
| Anfinn Kallsberg | 1523 |
| Edmund Joensen | 955 |
| Tórbjørn Jacobsen | 870 |